Shakin' Stevens – sang

Shakin' Stevens telist millum teir mest seljandi tónleikararnar í bretskum tónleiki nakrantíð. Sangir sum You Drive Me Crazy, Green Door, Oh Julie og This Ole House herjaðu á europeiskum hitlistum í 80'unum, og einki kundi steðga sangaranum úr Wales. Í august mánaði kann Shakin' Stevens upplivast live í Klaksvík



Fyri fyrstu nakrantíð sleppa føroyingar at hoyra tann framúr hittsangaran á føroyskum palli, tá ið Shakin' Stevens verður eitt av høvuðsnøvnunum á Summar Festivalinum í Klaksvík í august mánaði. Shakin' Stevens hevur eina ørgrynnu av hittum at oysa av, og hann telist millum teir best seljandi tónleikararnar í Bretlandi nakrantíð

TÓNLEIKUR

Summar Festivalurin fær í august mánaði ein forkunnugan gest úr Bretlandi. Shakin' Stevens, sum var eitt tað størsta navnið í europeiskum popptónleiki í 80'unum, kemur til Klaksvíkar at hava konsert við øllum sínum kendu sangum.

Shakin' Stevens varð føddur í Cardiff í Wales í 1948, og hann fekk navnið Michael Barratt. Longu á heilt ungum aldri fór hann at royna seg sum sangari og tónleikari, og hann tók beinanvegin listarliga navnið Shakin' Stevens. Fyrsti bólkurin, sum hann varð við í, kallaðist Shakin' Stevens And The Sunsets.

Tað var eingin succes beinanvegin, men í 1969 høvdu ungu menninir í bólkinum fingið mót upp á tað, og teir blivu yrkistónleikarar. Teir spældu á hægri læristovnum og á smærri spælistøðum í Bretlandi, og teir vóru eisini bidnir um at koma til onnur europeisk lond at spæla.

Shakin' Stevens And The Sunsets vóru ikki heitl fyri nothing, tí teir fingu kjansin at spæla saman við nøvnum sum Deep Purple, Chuck Berry, David Bowie og The Stones.

Shakin' solo

Í sjeytiárunum vóru teir í studio og spældu eina plátu inn fyri EMI og CBS. A Legend kallaðist plátan, sum varð framleidd av Dave Edmunds í Rockfield Studios. Eisini á pallinum høvdu teir vind í seglunum, tí teir vórðu valdir til besta konsertbólk í Bretlandi av New Musical Express í 1972.

Í 1977 gavst bólkurin at spæla, og tá hevði plátufelagið Track Records longu fingið eygað á Shakin' Stevens og hevði gjørt ein sáttmála við hann. Sama ár kom singleplátan Never út, og síðani kom ein onnur, Somebody Touched Me. Hóast góð ummæli, so eydnaðist tað ikki hesum plátum at selja nakað serligt í Onglandi.

Áðrenn tann næsta singleplátan kom, hevði Shakin' Stevens ein leikut í West End sangleikinum, sum gekk í 19 mánaðir fyri fullum húsum og vann fleiri virðislønir.

Eftir at singleplátan Justine var komin út í 1978, kom Shakin' Stevens við sínari fyrstu lp-plátu, sum verða uppkallað eftir sangaranum sjálvum.

Hendan lp-plátan var tikin upp live-on-tape. Øll sangirnir vóru spældir inn eftir einum degi í Island Studio, meðan Bob Marley arbeiddi í einum studio beint við síðuna av.

– Tað var sum ein stór veitsla. Upptøkurhølini vóru full av fólki, og tað var ovmikið at eta og drekka allatíðina, sigur Shakin' Stevens.

Gjøgnumbrot so tað stóð eftir

Eftir at Track Records fór á heysin í 1978, lá CBS beinanvegin fram við og gjørdi sáttmála við hann til útgávufelagið Epic. Tríggjar singleplátur vórðu givnir út, men gjøgnumbrotið kom ikki. Tað var ikki fyrr enn í 80'unum, at Shakin' Stevens av álvara fór at gera um seg.

Hóast rákið var punktónleikur, New Wave, Electrnoic og sonevnt New Romanics, so hevði tónleikurin hjá Shakin' Stevens nóg mikið í sær til at fáa fólk at lurta.

Fyrsta plátan, sum Shakin' Stevens gav út hjá Epic, kallaðist Take One og kom út í 1980, og singleplátan Hot Dog gjørdist